


# Luft/vatn hitapumpa

## Grøn orka. Sum tú vil hava hana.

Sniðgivið og framleitt í Danmark

DVI energi

”

Tað nýtist ikki

# at vera so stórt stig at gera

Tað nýtist ikki heimin betri.


DVI
energi

# Tað lættasta er at

# blunda.

Tú er her, tí tú veit, at hitapumpur eru millum orkubestu hitaloysnir, og tí tú sparir fleiri túsund krónur, tá ið tú skiftir el-, gass- ella oljuhita við eina hitapumpu.

Men tað kann kennast lættast at blunda so trupulleikin ikki sæst. Serliga um loysnin hvørki tykist vøkur ella skilagóð.

Sannleikin er, at tað er ov nógv av 'vit gera sum vit plaga' í hitapumpuídnaðinum. Tú eigur at vera á varðhaldi, tá ið onkur sigur tær, at um tað skal vera burðardygt, so mást tú slaka krøvini um fagurfrøði, inniluft, fleksibilitet og larm.

**Tá ið tað snýr seg um tøkni og snið á hitapumpum er løtan nú, at tú skal vera framsøkin. Nú er løtan at gera okkurt við veðurlags-broytingarnar - við tínum treytum.**



# Hitapumpan allýst

# á ein nýggjan hátt.

Í einum skjótt broytiligum heimi, broytast krøvini hjá húsaeigarum seg eisini. Vit lata okkum ikki sætta við tøknini frá í gjár, men halda tað vera ábyrgd okkara at reka tøknina inn á nýggjar óvæntaðar ræsir. Tað hevur við sær eina miðvísa tilgongd til hitapumputøkni og snið, ein tilgongd, ið ongantíð er stendur í stað.

**Heilt einfalt.**
**Alt tað sum tú vil hava – í eini hitapumpuloysn.**

Fá sum mest burturúr grønu hitakelduni við eini góðsku hitapumpu: snøgt snið, larmar ikki, framúr inniluft, reint baðivatn, óvanliga langa livitíð – og snildar stýriskipanir.


6 ára
garanti





# 10 góðar orsøkir

at DVI vermir bara eitt lítið sindur betri.

**Í botn og grund eru vit rættiliga nógv annarleiðis enn kappingarneytarnir. Vit eru í parti við húsaeigarunum og tað hevur havt við sær fleiri ítøkilig menningar- og sniðgevingarframbrot í vørum okkara. Øll hava tey tað til felags, at tey hava gjørt mun hjá donskum húsaeigarum.**

Orsøk nr 1

## Endiliga eina hitapumpa, sum ikki oyðileggur útsýnið

DVI er til tín, sum leggur dent á fagurfrøði. Vit leggja dent á tað minimalistiska og leggja okkum eftir tíðarleysum sniði, ið samantvinnar tað funktionella og tað hugtakandi. Tað praktiska og tað vakra.

Við okkum verður rætta umhvørvisvalið eisini tað lekrasta valið. Tí hava vit ment eina hitapumpu, sum kann setast júst har tú vil hava hana og hon fellir inn í umhvørvið.

Orsøk nr. 2

## Hjálpin er nærhendis.

Tú keypir DVI hitapumpuna frá góðkendum veitara í nærumhvørvinum. Við hesum stuðlar tú eisini eini lokalari handverkarafyritøku – og tað er stutt frá tanka til handling, eitt nú, tá ið hitapumpan skal setast upp ella hava eftirlit.

Orsøk nr. 3

## Hon heldur leiiiiingi.

Á donsku smiðjuni hjá okkum hava vit fult tamarhald á bæði sniðgeving og tilfari og eisini á framleiðsluni. Vit hava ment eina hitapumpu, ið tolir at standa á harðbalnum økjum, eitt nú í vindi og nær sjónum. 6 ára garanti er hitt besta á marknaðinum og samlaða livitíðin er eini 20-25 ár. Hetta takkað verið dygdartilfari og donskum handverki, tá ið tað er best.

Orsøk nr. 4

## Hugsa ikki um kulda.

DVI hitapumpan brúkar hitan í luftini uttanfyri og endurnýtur hann til at hita hús tíni og vatnið tit brúka. Superkreftirnar hjá henni eru, at hon dugir at taka orku úr lítlum hita og gera tað heitari. Eisini tá ið tað frystir 20 stig tekur hon hita úr luftini og koyrir tað inn í hús tíni. Í hitapumpuni er ein el-patrón, sum kann hjálpa teir allar kaldastu dagarnar.

Orsøk nr. 5

## Stýr hitanum, sum tú ongantíð hevur gjørt fyrr.

Við DVI Smartcontrol hevur tú alt beint hjá tær og sleppur undan at standa frammanfyri hitapumpuna og pilkast fyri at stýra hitanum í húsunum. Fjarstýringin og ein kalendari gera gerandisdagin lættari og við funkum, sum eitt nú lægri hita um náttina, frítíðarstilling og brúksvatn umvegis vikuætlan, sparir tú pening.

Skuldi tað heilt óvæntaða hent, at ólag verður á skipanini, so fært tú sjálvvirkandi boð. Og umvegis fjarstýringina kunnu vit rætta ólagið, so tú sleppur undan vitjan frá teknikara og koyripengum – og undan bíðitíð.



**”**

**Ongantíð hevur tað verið so lætt at hava tað gott.**

Orsøk nr. 6

## Ein íløga, ið merkist.

Hitapumpan hjá DVI er ment til at halda leingi, eisini í slavna og saltríka danska umhvørvinum. Ein vælment formgáva og eitt minimum av elektronikki og stýringslutum, har sárbæru lutirnir eru vardir í innipartinum av hitapumpuni.

Hetta merkir, at tað eru færri áheitanir um eftirlit, færri umvælingar og betri orkueffektivitetur – og tað gevur munandi sparingar.

Orsøk nr. 7

## Heitt vatn – einki høvuðbrýggj.

DVI hitapumpumpan hitar baðivatnið við einum vatnhitara, har vatnið streymar í gjøgnum, tí er eingin vandið fyri heilsuskaðiligu legionallabakteriuni.

Ein slík skipan har vatnið streymar í gjøgnum er eisini munandi dyggari, tá ið um vatnnøgd ræður, tí nýtist tær ikki at hugsa um, at einki heitt vatn er eftir, tá ið tú er undir brúsuni.








Orsøk nr. 8

## Ein DVI er tøk til øll heim.

DVI LV-kompakt hóskar, við teimum fimm ymsu støddunum 5, 7, 9, 12 og 16 kW, til alt frá lítlum summarhúsum til stór hús. Ein DVI hitapumpa er til øll sløg av býli. Eisini títt.

## Hvør DVI hóskar til tín?

DVI LV-kompakt 5, 7, 9, 12 og 16 kW

| | | |
|---|---|---|
| a | Hædd LV 5-7/9-16 | 1225/1425 mm |
| b | Niðurgrivið LV 5-7/9-16 | 925/1125 mm |
| c | Diametur | 950 mm |
| d | Minsta mát móti múri | 100 mm |
| e | Minsta mát móti jørðildi | 160 mm |






### Single

250 l innbygdur akkumuleringstangi.

GG: Single verður latin uttan vatnhitara har vatnið streymar í gjøgnum.

H: 1710 x B: 650 x D: 705 mm
(yvirtrom 1800 mm)

### Combi

Innbygdur 300 l akkumuleringstangi og vatnhitari har vatnið streymar í gjøgnum til heitt vatn.

H: 1910 x B: 650 x D: 705 mm
(yvirtrom 2000 mm)

Spyr seljaran, um tú ynskir at vita meiri.

Orsøk nr. 9

## So nógvir møguleikar.

Tá ið tú hevur eina DVI hitapumpu avgerð tú sjálv/ur hvar tú setur útipartin. Fleiri enn 200 løggild sølustøð eru tøk til tína tænastu og tú kann velja at seta sólorku saman við hitapumpuni, ella tú letur vera.

Ment til eina sjáldsama einfalda installatión og við innbygda akkumuleringstanganum, sleppur tú undan eksternum tanga, pumpum og rørføringum í húsunum. Tað tú sparir við rokningini og av plássi, tað ger tú sjálvsagt sjálv/ur av hvussu tú brúkar.

**Orsøk nr. 10**

# Ljóðið av friði.

Eitt støðugt suð og brumm frá luft til vatn hitapumpuni kann skjótt broyta gleðina um grøna og bíliga orku til øði um larmin.

Nýggja tøknin og sniðið í DVI hitapumpuni ger, at kalla einki óljóð er. Tað sindrið av ljóði, sum kemur frá skipanin, verður av sylindaraskapaða kabinettinum sent uppeftir. Harafturat kann hitapumpan setast har tú vil – langt burtur frá húsunum og hugnakrókinum í garðinum.

## Loyndarmálið um friðin.

- EC-motorur minkar orkubrúkið
- Veingir við sagtentum ljóðdoyvandi sniði
- 11 fastir veingir minka orkubrúk og larm
- Eitt langt ventilatorhhús minkar orkubrúk og larm
- Eitt runt útlátsrør minkar larmin og sendir hann upp í loft







Gevið gætur – tølini í yvirlitinum eru umleið tøl. Kelda https://roligbolig.dk/sadan-maler-man-stoj/ /

### Eini góð ráð!

Tað hevur týdning hvussu samanberingin verður gjørd. Tølini um ljóðið frá DVI hitapumpuni er mátað við hægstu ferð. Tað kann vera uppgjørt annarleiðis hjá øðrum veitarum.








# Danskt handverk. Donsk arbeiðspláss. Danskt framfýsni.

Fyritøkan hjá okkum stendur á støði frá 1979. Við støði í hesum arvinum sniðgeva vit í dag bæði virkisførar og fagurfrøðiligar smálutir, sum bæði gera gerandisdagin betri, einfaldari og vakrari.

Tá ið tú velur eina vøru frá DVI, so veit tú, at hetta byggir á ríka handverkarasiðvenju og byggir á sniðgávu, ið er tankavekjandi og tekur ábyrgd. Fremsta mál okkara er altíð at hjálpa tær, at leggja so fáar umhvørvissløðir eftir tær sum til ber.

## Hjá okkum á DVI ganga góðska og umhvørvið hond í hond.

Tað snýr seg um annað enn at lata til rætta stað til røttu tíð. Góðska og umhvørvið snúgva seg sum haldføri, sniðgávu og virkisføri – og ikki minst um tørvin hjá brúkarunum hjá okkum.

# Ofta settir spurningar

## Hvussu nógv kann eg spara uppá hitarokningina?

Sparingin kann vera stór. Um tú eitt nú skiftir frá oljufýring so kann sparingin vera meiri enn 50%. Við DVI forritinum kann lokali DVI-seljarin geva tær eina neyvari meting av sparingini.

## Hvørjar stuðulsmøguleikar havi eg?

Danmark ger nógv burturúr at minka um $CO_2$-útlátið og tí ber oftani til hjá donskum húsaeigarum at søkja um stuðul til íløguna í eina hitapumpu. Tú kann altíð venda tær til okkara at frætta um stuðulsmøguleikar og umsóknartreytir.

## Hvussu tryggi eg mær, at hitapumpan veitir besta mátt og at hon heldur sum longst?

Árliga eftirlitið er ikki bara lógarkrav. Tað er eisini lykilin at tryggja tær, at hitapumpan er so virkin og búskaparliga skynsom sum til ber – eisini um fleiri ár.

Eitt eftirlit merkir, at hitapumpan verður gjølliga kannað, har alt frá orkutøku, køling, stillingar og funkur vera kannaðar og um neyðugt betrað.

## Góðska – heit luft ella skilatos?

Hjá DVI meta vit um góðskuna á vøruni eftir livitíðini. Vit brúka bara góðskulutir frá eitt nú Danfoss, Grundfoss og Ziehl Abegg.

Útiparturin er gjørdur úr aluminium, sum tolir sjógv, og rustar tí ikki í slavna danska veðurlagnum. Eingin sárbarur elektronikkur er í útipartinum, hann er í staðin tryggur í partinum, sum er innandura.

## Hvussu er at brúka hitapumpuna?

Endiliga eitt danskt brúkaramót uttan kotur og styttingar. Brúkaramótið hjá DVI er hendinga brúkaravinarligt – sniðgivið so tú kann leggja til rættis og varðveitir yvirlitið. Skuldi okkurt verið, sum ikki riggar sum tað skal, fært tú beinleiðis boð um hvussu tað kann loysast, miðlað á máli, sum øll skilja.




DVI


11700211

# Vit eru her, tá ið tú hevur brúk fyri okkum.

Av tí, at vit veita heildarloysn – alt frá hitapumpu til innleggingartilfar og eykalutir – so veitir DVI hjálp, sum eingin annar. Vit selja umvegis netverk av seljarum um alt Danmark og veita vegleiðing til bæði privatar húsaánarar og fyritøkur.

Vit hjálpa tær fegin at finna hitapumpuloysnina, sum hóskar best til tykkum og tykkara tørv.

**Les meiri á www.dvienergi.com**

Selur hitapumpur frá Dansk Varmepumpe Industri A/S:

FN'S VERDENSMÅL
for bæredygtig udvikling

7 BÆREDYGTIG ENERGI
9 INDUSTRI, INNOVATION OG INFRASTRUKTUR
12 ANSVARLIGT FORBRUG OG PRODUKTION
13 KLIMA-INDSATS

FSC

09-03-2023


DVI energi

**Dansk Varmepumpe Industri A/S**
Industrimarken 2C, DK-9530 Støvring

dvienergi.com
info@dvienergi.com

Tel.: (+45) 9835 5244
CVR: DK-3055 3047